Tiltøk

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Tlf. 316491
Opið er hvønn mánadag-fríggjadag frá kl. 10.00–17.00.
Drekkamunnur og bløðini er at fáa hvønn dag.
Mánadagin 25. januar:
kl. 10–12: Itriv (møguleiki er at karða)
kl. 10–17: Seyma fýrkantar saman til teppir til Móður Theresufelagsskapin. Seymað verður alla vikuna.
kl. 15–17: Kortspæl, telving og onnur spøl.
Týsdagin 26. januar:
kl. 15–17: Upplestur, frásagnir, søgur og prát
Mikudagin 27. januar:
kl. 10–13: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12: Døgurði. Møguleiki er at koma sum gestur. Tilmelding mánadag (316491)
kl. 14.30: Túrur
Hósdagin 28. januar:
kl. 10.30–11: Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14–17: Teldupràt. Brandur Petersen
Fríggjadagin 29. januar:
kl. 10–17: Opið hús
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR
Sunnudagin 24. jan. kl. 14 verður gingið fram við Mígandalsá til Velbastaðar, gjøgnum bygdina og aftur til Havnar um Reynsmúlalág. Farið verður av Norðasta Horni kl. 14. Havið matpakka og góð, heit gonguklæði við. Gingið verður uml. 3 tímar. Tilmelding á Kunningarstovuni.

Læknavaktir

Tórshavn:
Leygardagin 23. jan.:
Kristianna Nordendal, tlf. 287400
Sunnudagin 24. jan.:
Sølvi W. Olsen, tlf. 316611

Eysturoy:
Leygardagin 23. jan.:
Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038
Sunnudagin 24. jan.:
Hálvdan Simonsen, tlf. 441490

Norðoyggjar:
Magnus Magnussen, tlf. 455451

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður):
Tlf. 371560

Suðuroy (suður):
Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

Gongufelagið Eysturoy
Limir í Gongufelagnum Eysturoy hittast til kaffifund á Restaurant Muntra í Fuglafirði sunnudagin kl. 15. Ljósmyndir frá Eystnestúrinum verða vístar.

Kafé Blákrossstovan
Kongagøta 8, Tórshavn, tlf. 321044
er opin mánadag til leygardag kl. 14–22, har eisini fæst hjálp og ráðgeving. Øll eru vælkomin.

Silvurbrúdleyp


2. februar hava Gidda og Hjørleif Vang í Kaldbak silvurbrúdleyp.
Dagurin verður hildin leygardagin 6. februar í Pálsstovu, Mykinesgøtu 7, Tórshavn kl. 13.00. Tey, ið ynskja at koma, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 315390 skjótast gjørligt – í seinasta lagi 30. januar.

70 ár

Í dag verður Thórmundur Joensen á Nesi 70 ár.
Dagurin verður hildin saman við familjuni á Stationsvej 18 í Hedehusene.

70 ár

Týsdagin 16. februar fyllir Julianna Didriksen í Havn, 70 ár.
Dagurin verður hildin fríggjakvøldið 19. februar kl. 19.00 í Pálsstovu. Tey, ið vilja gleða meg við at koma, biðjast siga frá innan 6. februar á tlf. 312552 ella 313572.



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Bergljott Poulsen á Rættartrøðni 490 Strendur

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: NAGLAKULDI

N	Ý	G	G	J	Á	R	S	D	Ø	G	V	E	R	Ð	I
Ý	L	I	R			O		E	L	G	A	R			Ó
G	A	B	A	R	D	I	N	E		G	R	I	P	U	R
G		R	N	E					O	G		K	Á	L	U
J	E	A	N	G	A	B	I	N			O	A	S	A	N
Á	L	K	A	R		Á	L	A	K	E	R		S	N	
R		T	R	E	L	L	É	B	O	R	G				K
S	T	A	N	S	A		U		N	I	A	G	A	R	A
B	O	R	I	S		S	M	A		K	N	Ú	K	U	R
Á	R		R	I	G	A		L	Ú	S		P	U	T	L
L	L	L		Ó	L	I		K	Ó	S		P	R		A
186	E	A	R	N		D		U		O	K	A		H	
T	I	N		I	A		K	R	Ó	N	U	R	N	A	R
A	V	G	I	N	G	I	N		L				Á	K	I
T	U	A	N		G	O	U	D	A		P	A	T	O	S
I	R	R	A	W	A	D	D	Y		K	O	R	I	N	T

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi høsdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunarorð: **187**
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:
- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:
- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.